*Ger vakurleika til veruleika*

CLINIQUE
100 % uparfumeret.




Nú er Merete frá Clinique aftur í Parfumarí Drós við góðum ráðum um húðrøkt og make-up

Ring og fá ókeypis tíð til serkøna ráðgeving, frá 13.05-18.05

parfumarí Drós
Bøgøta 15 • Tel. 314811 • Fax 314877


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 2800, Færøernes Erhvervsudviklingsfond (Framtaksgrunnur Føroya), 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Wilhelm Eyðinsson Petersen, Traðarvgur 3, 100 Tórshavn (formaður), Niels Christian Nolsøe, Berjabrekka 45, 100 Tórshavn (næstformaður), Karin Toftegaard, Tolvkarlevej 40, DK-3400 Hillerød, Gunvør Balle, Kráargøta 1, 160 Argir og Kristoffur Suni Laksá, 513 Syðrugøta.
Innkomin í nevndina: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík (formaður), Emma Dagmar Joensen, 370 Miðvágur (næstformaður), Sjúrður P. Horsdal, Millum Gilja 19, 188 Hoyvík, Eydna Justinussen, Dalakrókur 17, 100 Tórshavn og Árni Matras Dam, 460 Norðskála.

Skráseting Føroya tann 13. mai 2002

Kristin Balle


**Pedagogur/-hjálparfólk**
**til Bústovnin á Mýrivegi**

At arbeiða 40 tímar um vikuna, frá 01.06.02 ella eftir nærri avtalu. Talan er um skiftandi arbeiðstíðir og í vikuskiftum.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Á bústovninum búgva 4 ung/børn við autismu. Endamálið við okkara arbeiði er at skipa tryggar karmar hjá íbúgvunum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum er til gagn fyri hvønn einstakan.

Umráðandi er at umsøkjarin er væl fyri kropsliga, er áhugaður í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjarin hevur góð samstarvs- og innlivingarevni.

Um ongin pedagogur søkir, kann starvið verða sett av hjálparfólki.

Nærri fæst at vita um starvið frá Jóhonnu Hansen leiðara, á telefon 456310.

Umsóknarfreistin er 27.05.02 og skal umsóknin saman við prógvi og viðmæli sendast til:

**Bústovnin á Mýrivegi**
Mýrivegur 13 · 700 Klaksvík
Att: Leiðarin



**SERTILBOÐ Sky digital**

**Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.**

**Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.**
**Sjálvandi tann tryggasta loysnin. Hví noyðast við nakrar fáar rásir tá tú kanst síggja tær flestu.**
**Tað eru umleið 200 rásir at velja ímillum**

**Nøkur dømi:**
Sky One
Sky Sports 1-2-3-4
UK Gold
BBC 8 ymiskar
Channel 4 og 5
Discovery 14 ymiskar rásir
MTV 4 rásir
God Channel 2 rásir
Sky Movie 10 rásir
Disney Children 4 rásir
Cartoon Network 2 rásir
CNN News
FTV news
ITV sport




**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf. 421411 ella 215328**

**4.995,-**
**uml. 3 vikur bíðitíð**


# ítróttur

Nr. 90 • mikudagur • 15. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Henrik er bjartskygdur:

## – Vit skulu hava seks stig



*Henrik Larsen fer at broyta spælskipan, og hann fer eisini at gera eina roynd at fáa Toda Jónsson við aftur á landsliðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Nýggi landsliðsvenjarin boðaði beinanvegin frá, at hann fór at tosa við Toda Jónsson um at koma aftur á landsliðið. Hann ætlar sær eisini at broyta spælskipan, so framyvir fer landsliðið at spæla við fýra monnum í aftastu ketuni. Minsta kravið í komandi undankapping er seks stig**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

– Eg havi sett mær tað mál, at vit skulu hava í minsta lagi seks stig í hesi undankappingini. Tað eru avgjørt møguleikar at fáa stig á heimavølli móti Litava og Íslandi, og møguliga kunnu vit fáa meira burturúr, sigur ein bjartskygdur Henrik Larsen.

Fyrsti dysturin hjá nýggja venjaranum er ein venjingardystur móti Liktinstein 21. august. Síðani kemur Skotland til Føroyar 7. september. Í oktober skal landsliðið spæla ímóti Litava og Týsklandi á útivølli.

### Todi við aftur

Henrik Larsen hevur longu boðað frá, at hann fer at gera eina roynd at fáa Toda Jónsson við aftur á landsliðið.

– Tað hevði verið synd, um Todi ongantíð kom við aftur á landsliðið, tí hann er ikki ungur longur, og eg haldi, at hann møguliga broytir støðu einaferð, sigur Henrik Larsen.

Møguleikarnir hjá honum at fáa góð úrslit sum venjari økjast sjálvandi nógv, um Todi Jónsson velur at fara í aftur føroysku landsliðstroyggjuna.

Henrik Larsen ásannar, at hann ikki kennir nakað til føroyskan fótbólt, men hann fer at royna av øllum alvi at seta seg inn í viðurskiftini í her í Føroyum. FSF hevur sett honum nøkur krøv, sum áseta, hvussu ofta venjarin skal vera í Føroyum.

### Broytta skipan

Venjarin hevur gjørt greitt, at hann fer at nýta eina nýggja spælskipan. Framyvir fer føroyska landsliðið at spæla við fýra monnum í verjuni. Hetta verður í flatari verju við økismarkering. Allan Simonsen spældi allar síniar dystir við einum aftasta manni og tveimum frammanfyri, sum mansvardu ávísar álopsleikarar.

– Skipanin við einum aftasta manni verður ikki nýtt, meðan eg eri venjari. Eg fari at spæla við flatari verju, og vónandi fái eg nakrar bakkar, sum duga at vera við í álopsspælinum, sigur Henrik.

Enn hevur hann ikki gjørt av, hvussu skipanin verður á miðvøllinum og í álopinum, men møguleikarnir eru nógvir. 4-5-1, 4-4-2 og 4-3-3 hava verið havdir á lofti.

Henrik heldur, at tað er sera umráðandi hjá honum at hava ein góðan hjálparvenjara, men enn er ikki greitt, hvør hetta verður.

Dánjal Andreasen, formaðurin í FSF, duldi tó ikki fyri á tíðindafundi, at hann fegin vil hava Jógvan Martin Olsen at halda fram sum hjálparvenjari.

– Eg havi mínar hugsjónir um fótbólt, og tær fari at royna at føra út í lívið. Leikarar kunnu vænta sær at fáa størri ábyrgd á vøllinum, sigur Henrik Larsen at enda.

## Leikdagar ásettir

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Kappingarnevndin hjá FSF hevur ásett nýggjar leikdagar fyri teir dystirnar, sum ikki eru leiktir vegna verkfallið.

Fyrra hálvfinalan í steypakappingini millum VB og HB í Vági verður leikt mikudagin 5.juni, sum er Grundlógardagin. Seinnu hálvfinalurnar millum B68 og NSÍ og HB og VB verða leiktar hósdagin 13. juni.

Tveir dystir í 2. deild vórðu útsettir seinasta leygardag. Tað var dysturin í Vágunum millum FS Vágar og VB, og dysturin millum B36 og Sumba í Havn. Hesir verða leiktir mánadagin 20. mai, sum er 2. hvítusunnudagin.

Dystirnir í 3. deild millum TB og B68 á Tvøroyri og Royn og B36 í Hvalba verða leiktir leygardagin 18. mai.

## Zuma og Mykland í býnum

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Danska blaðið Politiken skrivar í dag, at suðurafrikanski framherjin hjá FCK, Sibusiso Zuma, hevði hildið sær á gleimi á einum diskoteki í Keypmannahavn náttina eftir steypafinaluna hósdagin, tá FCK tapti 2-1 fyri OB. Hetta var fríggjanáttina á diskotekinum Park.

Blaðið hevur tosað við fleiri fólk, ið siga seg hava sæð Zuma í býnum við vinmonnum. Sagt verður at Zuma kom inn á diskotekið klokkan tvey á nátt. Framherjin var ikki til venjing tann fríggjamorgunin klokkan 10, tá hópurin var savnaður fyri næstseinastu ferð undan avgerandi brakinum móti Brøndby. Almenna orsøkin var, at Zuma fekk viðgerð fyri skaða.

Hvørki ítróttarstjórin Niels Christian Holmstrøm ella venjarin Hans Backe vilja gera viðmerkingar til náttarlívið hjá Zuma.

**Mykland eisini sæddur**
Donsku bløðini skriva nógv um Zuma, men eisini norðmaðurin Erik Mykland er sekur í at hava verið úti náttina eftir steypafinaluna, hóast ein týdningarmikil dystur stóð fyri framman.

Mykland segði við danskar fjølmiðlar, at hann eftir steypafinaluna hevði ætlanir um at sita heima í urtagarðinum og drekka nakrar øl. Men Mykland var tó ikki bara heima í urtagarðinum. Sosialurin er vitandi um, at fyrrverandi landsliðsleikarin eisini úti í náttarlívinum í Keypmannahavn fríggjanáttina, og at promillan í øllum førum var omanfyri tað, sum ferðslulógin loyvir. Sambært donsku miðlunum var Mykland eisini ov seinur til venjingina fríggjamorgunin.

Enn hevur leiðslan í FCK einki gjørt við hesi málini, og hon vil heldur ikki gera viðmerkingar til tað.

## Lobanovskij er farin

DEYÐSFALL
*Stefan í Skorini*

Heimskendi fótbóltsvenjarin Valerij Lobanovskij úr Ukreina er deyður 63 ára gamal. Lobanovskij sló navn sítt fast í søgubøkurnar sum ein tann besti venjarin, sum gamla Sovjetsamveldið hevur fostrað.

Hann var landsliðsvenjari hjá bæði Sovjet og seinni hjá Ukreina, tá samveldið syndraðist. Harumframt var hann venjari hjá Dynamo Kiev í fleiri ár. Lobanovskij var eisini ein góður fótbóltsspælari í sinum ungu døgum.

Størsta avrik hansara var, tá hann førdi Sovjet fram til finaluna í EM í 1988, har liðið tó tapti móti Hollandi. Síðani hevur hann fingið fleiri góð úrslit við Dynamo Kiev.

Hann doyði mánakvøldið á einum sjúkrahúsi í Kiev. Hann varð innlagdur leygardagin beint eftir ein útidyst í landskappingini, tá hann fekk eina heilabløðing. Hann varð seinni fluttur til Kiev, tí støðan var so álvarsom.

Teir bestu læknarnir í landinum hava roynt at hildið honum á lívi við skurðviðgerð, men tað eydnaðist ikki.